## DAGSINS MEINING

# Solidaritetur

Forsorgarlógin byggir upp á eitt solidariskt prinsipp. Solidaritetur merkir ikki, at øll skulu fáa líka. Tey mest treingjandi skulu fáa mest. Einlig, tað verði seg forsorgarmóttakarar ella pensiónistar, fáa meira, tí tey eru verri fyri. So einfalt er tað.

Tað er ivaleyst ein leivd frá gamlari tíð, at man gongur útfrá, at um man livir saman, so er man giftur.

Vit skriva nú 2002 og vita sum er, at tað er langtfrá øll samlivandi, ið eru gift. Tá nú hetta rokið um hvussu illa stillaði hjún eru undir forsorgarlógini, so er ein tendensur til at venda málið á høvdið. Tað eru ikki hjún, ið eru ov illa stillaði. Ei heldur verða einlig ov væl stillaði. Trupulleikin er, at samlivandi fáa veiting sum einlig, tí at forsorgarlógin bert skilir millum gift og einlig. Tað er her trupulleikin liggur, hóast man seinastu tíðina hevur havt varhugan av, at tað eru tey giftu, ið sita við sviðið soð.

Tá nú røddir eru frammi, um at øll skulu fáa líka, so eigur man at hava eina prinsipiella diskussión um tað. Broytir man forsorgarogina til, at øll skulu fáa líka óansæð um tey eru hjún ella ikki, so víkir man burtur frá tí solidariska grundsjónarmiðnum, har tey mest treingjandi fáa mest.

Ístaðin fyri, at venda málinum á høvdið og síggja øll sum støk, so eiga samlivandi helst at verða betraktaði sum hjún. Man kundi til dømis sagt, at øll, ið søkja um forsorgarhjálp, verða flokkaði sum sambúgvandi, um tey deila adressu við einum øðrum, um tey ikki í umsóknini gera skrivtliga vart við, at so er ikki. Hetta kann til dømis verða, har onkur leigar kamar, ella har vaksnir familjulimir búgva saman. Ikki er vist, at hetta er rætta loysnins, men her er í hvussu so er eitt uppskot.

Einligar mammur og stakir pensionistar eru verri fyri, enn har tvey liva saman, og tí eigur man at taka hædd fyri tí. Talan er um eina álvarsliga moralska skriðu, um fólk fara so langt, sum at lata forsorgarlógina definera, um tey skulu giftast ella skiljast. Og vit vita sum er, at har ein skriðan er lopin er onnur væntandi. Vónandi enda vit ikki við einum samfelag, har fólk ístaðin fyri at siga sum nú, »hvat tørvar mær« fara at siga, »hvat havi eg rætt til.«

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tjóðveldisflokkinum velur lættastu loysnina og maktina

**Jóannes Eidesgaard**
*tingmaður fyri Javnaðarflokkin*



Sosialurin hevði í blaðnum í seinastu viku eina samrøðu við formannin í tingbólki Tjóðveldisfloksins Heina O. Heinesen um skuldsetingarnar ímóti løgmanni og Jørgen Niclasen, landsstýrismanni, sum partamaður hansara Torbjørn Jacobsen setti fram. Tað nýggja er sjálvsagt tað, at frá at Høgni Hoydal í alt summar hevur sagt, at hetta var eitt persónsmál, sum ikki skuldi viðgerast av flokkinum, so hava bæði aðalstjórn floksins og tingmanningin viðgjørt spurningin. Eg hugsi ikki, at nakar annar flokkur hevur givið hesum máli so drúgva viðgerð sum júst Tjóðveldisflokkurin.

Niðurstøðan er tó hon, sum allir føroyingar høvdu væntað. Teir taka støðuna til eftirtektar, yppa øksl og siga seg kunna liva við støðuni, sum hon er. Sostatt ger Tjóðveldisflokkurin einki við málið um løgmann og landsstýrismannin í fiskivinnumálum, sum annars eru lagdir undir ikki at kenna mun á sínum egna og tí, sum onnur eiga.

Eg kann vera samdur við Heina O. Heinesen so langt, at tað er ikki okkara borð at taka dagar ímillum, um skuldsetingarnar eru rættar ella skeivar. Tað er ikki okkara borð at døma ella fríkenna. Men hin vegin, so mugu vit hava eina støðu til, at landsins hægsta politiska starv er skuldsett og harumframt starvið hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. Vit eru politikkarar, og tí varða vit av politisku skipanini og hennara umdømi.

Heini O. Heinesen snarar málið 180 stig og sigur, at teir fara ikki at geva Torbirni Jacobsen munnkurv ella líknandi. Men tað er als ikki tað, sum málið snýr seg um. Málið snýr seg um, um vit kunnu liva við, at skuldsetingarnar eru settar fram og enn hanga enn i luftini, tí eingin partur í sakini hevur rørt hond frá síðu. Løgmaður og Jørgin Niclasen hava ikki reist sak um ærumeiðing, sum annars hvør einasti hampamaður hevði gjørt uttan himpr. Og tann, sum setti skuldsetingarnar fram, tegur nú og krógvar seg burtur. »The answers are blowing in the wind,« sum Tobbi hevði viljað sagt, tá hann enn var maður fyri sitt orð.

Og stuttligt verður, tá Høgni Hoydal fer at ferðast land og ríkið runt, nú hann hevur fingið sítt egna løgmálaráð, har hann fer at tosa um reinleika og rættartrygd í landinium. Sum orðatakið sigur: »Ofta etur hundur tað, ið hann havnar, og ketta tað, hon spýr.«

Men júst við at taka ta støðu, sum Tjóðveldisflokkurin hevur tikið, so er málið goymt burtur fyri well. Tykkara støða ger, at samgongumeirilutin velur samgonguna fram um, at eitt nú løgtingið kemur til orðanna í málinum. Tykkara støða ger, at andstøðan einki fær gjørt. Tykkara støða er at verja løgmann og landsstýrismannin í fiskivinnumálum, ja stutt sagt allan Fólkaflokkin. Tað er so eitt val, sum vit aðrir mugu taka til eftirtektar. Tit seta kikaran fyri blinda eygað og velja at liva við skuldsetingunum, sum eingin stjórnarlimur í vesturheiminum hevði kunna ella vilja livað við. So tá aðalstjórnin og tingmanningin hava tikið hasa støðuna, so hava tit ikki bert tikið eina innanfloksstøðu, men tit hava eisini tikið støðu fyri, at eingin annar kann gera nakað. Tit vóru lykilin til eina politiska viðgerð, men tit hava læst av og velja at fasthalda maktina.

Tykkara støða er seinasta orðið í hesi annars spennandi summarkrimisøgu.

# Tað er neyðugt at hildið verður fram...

**Fríðálvur Jensen**



...við arbeiðinum at fáa fyribyrgjandi boðskapin út til Føroya fólk, tí innan fyribyrging móti eldi eru tað serliga tryggingarfeløgini, brunaumsjónin og sløkkiliðini, sum áhaldandi mugu fáa boðskapin »betri fyrivarin enn eftirsnarin« út til fólkið.

Tá eg var í feriu uttanlands, hoyrdi eg um syndarligu vanlukkuna, tá tveir dreingir doyðu í herviligum eldsbruna.

Eg sá onkra yvirskrift í bløðunum, at tryggingarfeløgini áttu at givið kundunum roykvarnarar, og tað eri eg púra samdur í, tí fyri tað fyrsta bjargar hetta mannalívum og harafturat minkar hetta um skaðabøturnar.

Hetta var eisini, í mínum arbeiði, nakað eg royndi at fáa leiðsluna at umhugsa, og er tað at frøðast um, at deildarleiðarin, Emil Simonsen, á Tryggingarfelagnum Føroyar í samrøðu nevndi, at spurningurin aftur er til viðgerðar.

Roknað vit við, at feløgini kunnu keypa roykvarnarar fyri 50 kr. stykkið, og hvør kundi skal fáa tveir, er hetta ein eingangsútreiðsla uppá umleið 1,7 milliónir krónur.

Eitt er at fáa sett ein roykvarnara upp á røttum stað, men tað er líka umráðandi at syrgja fyri at hesin virkar, tá brúk er fyri honum, og hetta skal tað áhaldandi upplýsast um.

Hinvegin varð okkara arbeiði bygt á at fáa húsarhaldini at síggja týdningin av at ansa sær og at útvega sær roykvarnarar, eldsløkkjarar o.a., fyri at fáa trygdina uppá eitt hægri støði.

Í 1996 vóru vit og sløkkiliðið í Havn við í stóra átakinum »F-dagarnir«, tá uml. 7.000 skúlanæmingar fingu frálæru um hvussu sleppast kundi undan skaða av t.d. eldi, ferðsluóhappum o.ø.

Eisini varð á hvørjum ári, umvegis fjølmiðlarnar, gjørt nakað á økinum, tí fyri leiðsluna á Brunatryggingini var hetta ein tænasta, vit áttu at veita kundunum.

Tá hugsað verður um fyribyrgjandi arbeiðið, er tað neyðugt við áhaldandi boðskapinum um at ansa sær, og at eitt og hvørt átak í hesum sambandi, er við til at vit kunnu kenna okkum tryggari í hesum annars so ótryggu tíðum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Don't kill the messenger

**Jørn Astrup Hansen**



Sosialurin havde den 16. august 2002 en usædvanligt skarp leder, Primadonnunúkkur i peningastovnunum. Jeg tror, det forholder sig med lederskribenten på samme måde som med bondemanden i H. C. Andersens eventyr om Lille Claus og store Claus. Bondemanden var sådan en god mand, men han havde den forunderlige sygdom, at han aldrig kunne tåle at se degne; kom der en degn for hans øjne, blev han ganske rasende. Lederskribenten synes at have det på samme måde; han kan ikke tåle at se pengeinstitutter.

Angiveligt har ordningen, hvorefter der kan opnås rentestøtte til boliglån men ikke til forbrugslån, givet anledning til misbrug. Det bør ikke overraske; selv uden revisorbistand vil omgåelsesmulighederne forekomme den skikkelige husejer brede som ladeporte. Rentestøtteordningen forudsætter et pengevæsen med cigarkasser i forskellige farver. Og nok kan man fortsat finde folk, som holder styr på økonomien ved hjælp af to cigarkasser. Men ved nærmere eftersyn vil det ofte vise sig, at der i den ene kasse er ubetalte regninger og i den anden - cigarer.

Alle ved, at det er med kapital som med rindende vand. Vandet finder altid den korteste vej. Det samme gør kapitalen. Og lige som man ikke kan skille det varme vand fra det kolde vand, når vandet først er løbet sammen, så er det svært at finde ud af, hvor pengene kom fra, når de først er brugt. Penge lugter ikke. – I alt fald ikke ret godt, som nogle ville føje til!

Det er ikke rimeligt, at politikere og pressen skyder på pengeinstitutterne, nu det viser sig, at rentestøtteordningen er svær at administrere og tilsyneladende har givet anledning til misbrug. Pengeinstitutterne har gentagne gange advaret mod ordningen, som administrativt er et monster, og som inviterer til misbrug. Hvis der er nogen skyldige i denne sag, er det politikerne, som hastede en dårlig lov igennem, og som valgte at overhøre alle advarsler, medens tid var. Og så skal der da nok være nogle opfindsomme husejere, som har været mindre nøjeregnende og har haft held til at finansiere et bilkøb mod pant i huset. Men jeg kan ikke tro, at pengeinstitutter bevidst har medvirket til at føre skattevæsenet bag lyset.

Det forekommer, at vi på Færøerne har en utilstrækkelig tradition for at høre interesse- og brancheorganisationer i forbindelse med udarbejdelse af forslag til nye love. Selvsagt er det politikerne, og ikke organisationerne, der skal lovgive. Men det kunne da sikkert være nyttigt at spørge dem, der må antages at have en relevant praktisk erfaring, hvordan en ny lov kan forventes at komme til at virke. Det er jo ikke sikkert, at organisationerne blot vil modarbejde lovgiverne. Det kunne jo være, at det med f.eks. pengeinstitutter forholder sig anderledes end med degne!

Den aktuelle opstandelse om rentestøtteordningen bringer i øvrigt erfaringerne med den gamle renteskatteordning fra 1978 i erindring. I de glade 80'ere kunne 42 pct. af renteudgifterne trækkes fra i skatten, medens renteindtægter af indlån i færøske pengeinstitutter kunne hæves skattefrit; der blev alene beregnet en skat på _ pct. p.a. af indeståendet. Ordningen var en veritabel pengemaskine, der fik Glistrup til at tage sig ud som en nyvasket novice. Pengemaskinen kunne producere nulskatteydere på samlebånd, blot den glade bruger var i stand til at løse ligninger med én ubekendt. Det er næppe troligt, at politikerne ikke var bekendt med forholdet.

Så længe pengemaskinen kun blev brugt af en lille, oplyst inderkreds med adgang til kvalificeret rådgivning, gav ordningen imidlertid ikke anledning til bekymring hos de ansvarlige myndigheder. Men da Palleba sidst i 80'erne også ville have del i pengemaskinens herligheder, fik politikerne rigtignok travlt med sandsækkene. Men da var det for sent; vandet stod allerede højt i gaderne.

Med erfaringerne fra den gamle renteskatteordning i erindring, må det vel være tilladt at spørge, hvorfor administrationen af rentestøtteordningen først nu trækkes frem i lyset. Pengeinstitutterne har lige siden vedtagelsen af loven om rentestøtte dog vedvarende gjort opmærksom på risikoen for misbrug af loven.

Skattelove er nu en gang et anliggende mellem politikerne og borgerne. Borgerne navigerer, som de bedst kan, inden for – en gang imellem uden for – gældende skattelove. Men det er politikerne, der giver lovene. Ikke pengeinstitutterne.

***Netamaðurin***




**25. februar 1997:**
**Stjórin í Føroya Banka heldur, at bruttoskattalógin kann freista veikar sálir, men hesum vísir fíggjarmálaráðharrin aftur**


# Hjálparfólk til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna á Rókini verður søkt eftir 1 hjálparfólki 30 tímar um vikuna at byrja 1. september, ella skjótast tilber.

Starvið er á stovu við 18 børnum 3-7 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum, og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Meira fæst at vita um starivð við at venda sær til Juliannu Næs leiðara tlf. 225222/444940.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 30. august kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður 14. august 2002

**Fuglafjarðar býráð**

# Hús við Marknagilsvegin



Við hesum verður sethúsaognin Marknagilsvegur 70b, Tórshavn lýst til sølu.

Húsini eru bygd í 1988, eru í tveimum hæddum, hvør á 137 $m^2$ umframt hjall.

Kjallarin er óinnrættaður. Í miðhæddini eru durur, gangur, wc, baðirúm, 2 kømur, hjúnarúm, køkur, grovkøkur og stova. Trappa er upp á loftið, sum tilber at innrætta. Partur av arbeiðinum er gjørt. Húsini eru í góðum standi.

Grundøkið er 661 $m^2$. Ognin liggur frítt fyri og útsýnið yvir býin og fjørðin er avbera gott.

Ognin verður seld, um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145